

HANS JOENSEN, VÀGUR:

Á jóansøku er ein blí›ur vi› fólk. Eg rokni vi› at fáa vitjan og so vóni eg eisini, at ve›ri› ver›ur gott. Nú eri eg heima í ár og tá plagi eg at skjóta fyri bátunum, tá kappró›ur er.

HANS JACOB HJELM, VÁGUR:

Vónandi ver›ur ve›ri› gott. Annars vænti eg fólk inn á gólvi› og so skal eg rógva og spæla til dans.

Vælkomin á jóansøku ár 2000 í Vági

Mynd: Dagfinn Olsen

Nú tann fyrsta jóansøkustevnan í hesum ártúsundáratalinum ver›ur hildin í Vági í døgunum 24. og 25. juni, ver›ur hervi› bjó›a› øllum at vera vælkomin til Vágs at halda jóansøku.

Su›uroyggin bjó›ar seg fram á hvørjum ári til at halda stevnu, at halda jóansøku, og ver›ur hetta ólíkaárini á Tvøroyri og líka árini í Vági, og er hetta vikuskiftini uml. 24. juni, sum er jóansøkudagur.

Ta› hevur sín t‡dning at bjó›a seg fram til at halda stevnur, ta› kemur líkasum øllum vi›.

Tiltøkini, tey eru mong. Ein jóansøkunevnd skipar fyri og er ta› ikki so líti› av arbei›i, i› ver›ur lagt í slíkar stevnur, ta› skal vera pláss fyri øllum, bæ›i ungum og gomlum, møguleiki skal vera hjá flest øllum at fara til okkurt tiltaki›, sum er á jóansøku – og skal nevndin hava takk fyri teirra arbei›i. Tey seinnu árini hava nógvir skúlaflokkar, sum í síni tí› hava gingi› í skúlan á Oyrala›num og skúlan í Tippinum, vitja til Vágs á jóansøku, har tey hittast og minnast á gamlar dagar, eisini koma fólk nor›anfjør›s og uttanlands frá heim at halda stevnu saman vi› vágbingum.

Ta› er hugaligt at síggja hesi mongu fólkini vitja aftur, mong teirra hava veri› burtur í mong ár, hesi fólkini hugsa helst solei›is, at mangt er broytt her á sta›num, sí›an tey bú›u her, ta› vil so ver›a. Vágbingar vilja fylgja tí›ini, solei›is at vit kunnu búleikast her fram yvir og tá slepst ikki undan ymiskum broytingum, ta› ver›ur ney›ugt.

Nú ta› er stevna og vit øll koma saman at hugna okkum, eiga vit at royna at leggja alt ta› tunga á hillina og gle›a okkum saman vi› gestum og teimum, sum her í oynni búgva, ta› hava vit øll somul brúk fyri, at gle›ast saman vi› ø›rum.

Gó›u ítróttarfólk úr øllum landinum, vit takka fyri tykkara luttøku á stevnunum, tit gera stevnurnar møguligar og serliga áhugaverdar.

Gó›u jóansøkugestir, enn einafer›, hjartaliga vælkomin til Vágs at halda jóansøku saman vi› okkum vágbingum.

Gó›a jóansøku

Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur

Fyrsti studenturin í oynni ár 2000

Mynd: Dagfinn Olsen

Rannvá Augustinussen var› fyrsti studenturin í Su›uroynni ár 2000

DAGFINN OLSEN

Mi›námsskúlin í Su›uroynni liggur í Vági. Og í ár ver›ur pisufundirin eisini í Vági, tí har jóansøkan er, er pisufundurin eisini. Hetta er bert 2. fer›, at pisufundur er í Vági, tí ta› er ikki langt sí›ani, at gjørligt var› at taka hesa útbúgving í Su›uroynni. Á›ur var HF skei› í oynni.

Í ár var› ta› Rannvá Augustinussen úr Vági, i› gjørdist fyrsta pisan í oynni. Mánadagin fekk hon húgvuna á høvdi› og me›an lesarin lesur hesar reglur, er hon á fer› millum húsini hjá floksfeløgum, har gle›isrómurin er almikil, nú 3 ára strí› er av.

Men so liggur framtí›in opin. Rannvá hevur enn ikki gjørt av, hvat hon ætlar sær í framtí›ini. Hon veit tó heilt víst, at hon ætlar at arbei›a eitt ár, á›renn nøkur avger ver›ur tikin hesum vi›víkjandi. Sosialurin ynskir Rannvá og hinum pisunum tillukku vi› húgvuni og próvnum og gó›a jóansøku!

PETUR OLAF Í LÁGABØ, VÁGUR:

Vónandi ver›ur gott ve›ur. Eg rógvi vi› Vágbingi og vit fara at fáa okkum ein døgur›abita saman leygardagin og seinni at rógva. Vónandi klára vit at fáa eitt 1. pláss ella 2. pláss.

Rudda, mála og asfaltera

Vágbingar eru í vikuni rættiliga farnir at snøgga Vágsbygd, so jóansøkugestir kunnu kenna seg væl. Ikki bert fremmandir gestir vitja, tí sera nógvar floksveitslur eru í ár, har fólk hittast aftur vi› skúlafelagar. Bygdin hevur veri› endavend og umfatandi arbei›i er fari› fram vi› at asfaltera vegirnar, sum eisini hava trongt til eina bøtandi hond.

Dagfinn Olsen

Í ár sermerkir or›i› floksveitsla jóansøkuna hjá mongum. Fleiri vágbingar fylkjast aftur í flokk, eins og í skúlaárunum. Hóast mong ivaleyst búgva í Vági ella í Su›uroynni enn, so vil so ver›a, at mong eru flutt úr oynni ella av landinum. Sera nógvar samkomur av gomlum skúlabørnum seta dám á jóansøkuna, nú vit skriva ár 2000.

Anna›, i› setir dám á undan jóansøkuna er, at ung og eldri royna at frí›ka um. Fólk síggjast gera í stand gar›ar og aldingar›ar. Máling og penslar eru frammi í gó›ve›rinum og skúlabørnini hava rudda› framvi› veg og strond.

Eisini kommunan hevur spíla› seg út. Menn hava rudda› og frí›ka› um kommunal øki. Eisini hava undan jóansøkuni sæst stórar maskinur á vegunum. Og vegirnir hava veri› enntá verri at koyrt á, enn frammanundan. Men alt tænir einum hægri endamáli.

Ta› er nevniliga so, at Vágs Kommuna hevur sett sær fyri at asfaltera høvu›svegirnar undan jóansøkuni. Ovari og ni›ari vegur ver›a asfaltera›ir.

Jógvan Krosslá plagar skemtandi at taka til, tá onkur spyr, hví alt ikki ver›ur asfaltera›, at kommunan hevur ein asfaltpoilitikk. Í hesum umfarinum eru ta› høvu›svegirnir, i› eiga tørn. Sí›ani koma a›rir vegir í seinni umførum. Ta› er nevniliga so, at í dag ver›ur alt arbei›i goldi› beinanvegin. Einki er uppá borg.

Og ta› er ikki sørt, at asfalt, rudding og máling gevur úrslit. Í gó›ve›rinum er Vágsbygd vøkur á at líta og gestir kunnu ikki anna› enn kenna seg vælkomanr á jóansøku ár 2000.

Ì gó›ve›rinum fyrst í vikuni, funnu vágbingar spann og pensil fram og bæ›i gar›ar og húsaveggir eru nú i jóansøkustandi

Myndir: Dagfinn Olsen

T‡sdagin rudda›u skúlabørn í Vági framvi› vegi og strond, so jóansøkugestir kunnu kenna seg vælkomnar

Gerandisdagurin i Vági, hevur hesa vikuna veri› merktur av, at umfatandi asfaltabei›i er í ger›, i› er partur av eini heildarætlan